# VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landnyrðingi og norði og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum ÷3 stig og frostmarkið.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi, seinnapartin upp í hvassan vind. Kavaælingur, men eisini sólglottar og hitalagið millum ÷1 og +2 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum ÷1 og +2 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og norði og sólglottar, men eisini kavaælingur. Hitalagið millum ÷2 og +2 stig.

## DAGSINS FØROYINGUR

# »Gott at arbeiða á Klaksvíkar Sjúkrahúsi«

**Judith Mohr av Viðareiði arbeiðir sum skrivstovukvinna á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Tað hevur hon gjørt í 25 ár, og har dámar henni sera væl**

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Judith Mohr av Viðareiði dámar væl handaligt arbeiði*

*Mynd: Snorri Brend*

**■ Hvussu leingi hevur tú arbeitt á Klaksvíkar Sjúkrahúsi?**
– Eg havi arbeitt her síðani 1981. Tey søktu tá eftir einum feriuavloysara til vekslaran. Eg søkti og fekk arbeiðið, og har eri eg enn.

**■ Hvat er títt dagliga arbeiði?**
– Eg arbeiði í bókhaldinum, og taki mær m.a. av rokningum sum koma inn.

**■ Hvat ger tú í frítíðini?**
– Eg passi hús, bindi og broderi, gangi til aerobic og til handarbeiði á Viðareiði. Annars so syngi eg við KFUM & K-kórinum í Klaksvík, og siti í nevndini fyri missiónshúsið á Viðareiði.

**■ Hvat er tín lívrættur?**
– Hatta er ringt at svara uppá, tí mær dámar alt væl.

**■ Hvørjum vil tú heilsa?**
– Farna vikuskiftið var eg á familjulegu í leguhúsinum í Nesvík. Eg vil fegin heilsa øllum teimum, sum eg var saman við.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 4 |
| Nuuk | 9 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | -1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 3 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 4 |
| Tromsø | -4 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -2 |
| Keypmannah. | 0 |
| Helsinki | -13 |
| Moskva | -3 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | -5 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 2 |
| Paris | 0 |
| Madrid | 5 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 11 |
| Athen | 13 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 15 |
| Beijing | 1 |
| New Dehli | 26 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | -2 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 31 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 27 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1045 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum stendur mestsum í stað og viknar nakað. Eitt lágtrýst, 994 hPa. við Lindesnes stendur mestsum í stað og dýpist.




**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Norðsjónum stendur mestsum í stað og vestan fyri lágtrýstið rekur køld luft framvegis av norði móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 27/2 kl. $06^{00}$– 28/2. $06^{00}$. Hitin í gjár: -0,6°
Minsti hiti máldur í febr.: -11,0° - Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,9 mm – mált frá 27/2 kl. $06^{00}$– 28/2 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í februar: 72,1 mm

# Lesið Sosialin



**Vika 8 – 25. febr.**
Vinnaratøl: 06 - 09 - 13 - 18 - 19 - 24 - 30

Eykatøl: 07 - 31

| | |
|---|---|
| 7 vinnaratøl: | 3.374.808,- kr. |
| 6 vinnarat.+ eykatal: | 55.681,- kr. |
| 6 vinnaratøl | 2.808,- kr. |
| 5 vinnaratøl: | 128,- kr. |
| 4 vinnaratøl: | 39,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum



**Vika 8 – 25 . febr.**
Jokaratal: 4 - 1 - 3 - 4 - 3 - 1 - 1

| | |
|---|---|
| Øll 7 rætt: | Eingin/0,- kr. |
| 6 aftastu rætt: | 600.827,- Kr. |
| 5 aftastu rætt: | 25.063,- kr. |
| 4 aftastu rætt: | 2.263,- kr. |
| 3 aftastu rætt: | 242,- kr. |
| 2 aftastu rætt: | 49,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum



**TIPS 13 úrslit**
**Vika 8 – 25. febr.**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Blackburn - Arsenal | 1 |
| 2. | Chelsea - Portsmouth | 1 |
| 3. | Charlton - Aston Villa | x |
| 4. | Birmingham - Sunderland | 1 |
| 5. | Newcastle - Everton | 1 |
| 6. | Brighton - Watford | 1 |
| 7. | Watford - Cardiff | 1 |
| 8. | Sheffield U - Queens Park R | 2 |
| 9. | Ipswich - Leicester | 1 |
| 10. | Hull - Wolverhampton | 2 |
| 11. | Derby - Plymouth | 1 |
| 12. | Stoke - Millwall | 1 |
| 13. | Southampton - Sheffield W | 1 |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 13 rætt: | 12.788,- kr. |
| 12 rætt: | 18,- kr. |
| 11 rætt: | 10,- kr. |
| 10 rætt: | Eingin/0,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

# VESTFALLSKYRRINDI

27. februar — Mánin næstur jørðini
28. februar — Tendring

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 27. Febr. | 05.55 | 18.21 | 04.55 | 17.21 | 05.10 | 17.36 | 07.55 | 20.21 | 08.55 | 21.21 | 04.10 | 16.36 | 03.10 | 15.36 | 06.10 | 18.36 | 07.10 | 19.36 | 05.40 | 18.06 | 06.55 | 19.21 |
| 28. Febr. | 06.46 | 19.11 | 05.46 | 18.11 | 06.01 | 18.26 | 08.46 | 21.11 | 09.46 | 22.11 | 05.01 | 17.26 | 04.01 | 16.26 | 07.01 | 19.26 | 08.01 | 20.26 | 06.31 | 18.56 | 07.46 | 20.11 |
| 1. mars | 07.34 | 19.58 | 06.34 | 18.58 | 06.49 | 19.13 | 09.34 | 21.58 | 10.34 | 22.58 | 05.49 | 18.13 | 04.49 | 17.13 | 07.49 | 20.13 | 08.49 | 21.13 | 07.19 | 19.43 | 08.34 | 20.58 |
| 2. Mars | 08.21 | 20.45 | 07.21 | 19.45 | 07.36 | 20.00 | 10.21 | 22.45 | 11.21 | 23.45 | 06.36 | 19.00 | 05.36 | 18.00 | 08.36 | 21.00 | 09.36 | 22.00 | 08.06 | 20.30 | 09.21 | 21.45 |
| 3. Mars | 09.08 | 21.31 | 08.08 | 20.31 | 08.23 | 20.46 | 11.08 | 23.31 | - | 12.08 | 07.23 | 19.46 | 06.23 | 18.46 | 09.23 | 21.46 | 10.23 | 22.46 | 08.53 | 21.16 | 10.08 | 22.31 |